Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

# Good Will Hunting



Matt Damon hevur við leiklutum í the Rainmaker, Saving Private Ryan og øðrum stórfilmum av álvara sligið sítt navn millum stóru Hollywood stjørnurnar, men tað var í Good Will Hunting, at hann fyri fyrstu ferð veruliga gjørdi um seg.

Her skrivaði hann saman við Ben Affleck sjálvur eitt handrit, sum framleiðarar vóru altráðir eftir at fáa hendurnar á, men tað bleiv so Gus Van Sant, sum fekk loyvi at koma upp í part.

Damon hevur sjálvur høvuðsleiklutin sum Will Hunting. Ein ungur harri, sum hevur eitt óvanligt støddfrøðisligt flogvit. Myndaminnið er eisini framúr, eins og hann hevur evnini at finna nýggjar loysnir upp á kompleksar trupulleikar.

Hann starvast á støddfrøðisliga instituttinum í Boston – har hann vaskar,



og sjálvur hevur hann ongar ætlanir um at gera meira enn júst tað.

Ein av lærarunum á stovninum kemur tó eftir evnunum hjá Will, og tí fær hann brádliga møguleikan at menna síni evni. Trupulleikin er bara, at Will sjálvur ikki hevur nakran serligan hug til hetta.

Soleiðis gongur søgan um unga mannin við góðu evnunum, sum hann ikki torir at gagnnýta. Heldur ikki hóast Chuckie (Ben Affleck) roynir at skumpa undir hann. Will vil heldur nýta tíðina í eini roynd at skora Skylar, men at enda verður Will vístir til sálarfrøðing í eini roynd at fáa skil á høvd hansara.

Sum sagt, so fingu teir báðir, Affleck og Damon, av álvara gongd á yrkisleiðina eftir filmin, sum í síni tíð varð nomineraður til níggju Oscars. Og sum millum annað vann virðislønina fyri besta handritið.

# Star Wars





Legendariska røðin hjá George Lucas verður nú sýnd á TV3. Vit hitta Luke Skywalker, sum leingist eftir at uppliva nøkur ævintýr. Hann býr hjá gubbanum og gummuni, men tá hesi verða myrd av teimum sonevndu Stormtroopers, er Luke at kalla einsamallur. Hann finnur útav, at ein av hansara androidum, R2-D2, hevur eini boð frá Leia prinsessu. Hon biðjur Obi-Wan Kenobi um hjálp, og Luke fer tí at leita eftir Obi-Wan. Hóast tey ikki eru so hugað fyri tí, so fær ahnn hjálp frá Solo og teirri brølandi Chewbacca.

Trupulleikar eru á leiðini, men hesir fáa tó ikki Luke at missa móti. Hann ætlar sær at bjarga bæði Leia og allari galaksuni.